# Astri Luhin prýða skúla

Tað verður listakvinnnan Astri Luhin, sum skal listprýða Skúlan á Argjahamri. Tað hevur Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu gjørt av, eftir at hava mett um innkomnu uppskotini, sum umboðaðu ein breiðan skara av listafólkum, verður sagt á heimasíðini hjá kommununi. 19 uppskot komu inn frá 24 listafólkum. Í Listabólkinum hjá Tórshavnar kommunu sita Jákup Simonsen, Mikal Viderø, Helgi Fossádal og Jógvan Elias Winther Poulsen.



# Amerika og country á Listasavninum

**Amerikansk list, countrytónleikur og nýggir leskidrykkir verða á skránni, tá framsýningin *Picturing America* letur upp á Listasavninum fríggjadagin**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

*Picturing America* er ein verkætlan, sum gevur næmingum og borgarum høvi til at læra um amerikanska søgu ígjøgnum amerikanska list. Framsýningin, sum varð avdúkað av táverandi forsetanum, George W. Bush í 2008, hevur verið at sæð á fleiri enn 75.000 skúlum, bókasøvnum, listasøvnum og øðrum stovnum kring USA.

### Listarligur arvur

Nú fáa so eisini føroyingar høvi at síggja hendan amerikanska listaarvin, har bæði málningar, høggmyndir, arkitekturur, handverk og foto bjóða eldri sum yngri eitt innlit í eyðkennini, hugmyndirnar og dreymarnar í stóra landinum vestanhav. 40 endurskapaðar myndir í bestu góðsku av týðandi amerikanskari list eru grundarlagið undir gransking av amerikanskari mentan, politikki og søgu gjøgnum tíðirnar á ein nýggjan og áhugaverdan hátt, verður sagt í skrivi frá Listasavninum

*Picturing America* er sett saman av National Endowment for the Humanities (NEH) í samstarvi við American Library Association. NEH er ein sjálvstøðugur grunnur undir amerikansku stjórnini, ið skal fáa pening til vega fyri at stuðla gransking, undirvísing, varðveitslu og almennum verkætlanum í hugvísindi.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 12. mars kl. 17.00 í Listaskálanum í Gundadali. Amerikanski sendiharrin í Keypmannahavn, Laurie S. Fulton, setir framsýningina.

Føroya Bjór borðreiðir við nýggjum amerikanskum leskidrykkjum á ferniseringini, tá eisini føroyska Nashville-countrystjørnan Hallur Joensen við bólki hevur framførslu.



*Freedom of Speech, The Saturday Evening Post 1943; Norman Rockwell (1894-78)*



*Selma-to-Montgomery March for Voting Rights in 1965; James Karales (1930-2002)*

# Hvør skal stýra listini?

**Skal listin stuðlast og harvið kanska stýrast ávísan veg. Ella skal hon vaksa vill? Hetta verður evnið á almennum fundi í Miðlahúsinum í kvøld**

KJAK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nú Mentanargrunnurin skal umskipast, reisir spurningurin seg aftur um, hvussu peningurin úr grunninum skal býtast út á listarliga økið.

Hvussu skulu hesir pengar brúkast? Skulu vit yvirhøvur, frá almennari síðu, stuðla list, sum ikki klárar at skapa sítt egna, fíggjarliga grundarlag.

Og um vit skulu stuðla list, hvussu skal tað so gerast? Hvør skal gera av, hvat skal stuðlast? Skulu tað vera politikarar? Ella embætisfólk í Mentamálaráðnum? Ella fólk við viðkomandi útbúgvingum?

Og hvørji skulu kriteriini vera? Hevur sokallað »góð« list, sum vendir sær til fá fólk, størri rætt til stuðul enn meira fólkslig list, sum fleiri fólk taka til sín?



*Skal listin stýrast ella sleppa at vaksa vill?, spyrjar kjakarar á fundi í Miðlahúsinum í kvøld*

Skulu vit, gjøgnum tann almenna stuðulin, stýra listini ein ávísan veg?

Hetta eru nakrir av spurningunum sum verða viðgjørdir á almennum fundi í Miðlahúsinum mikukvøldið 10. mars klokkan 20 undir yvirskriftini »Stýring ella villur vøkstur?«

Við pallborðið sita fólk úr føroyska listaumhvørvinum, sum hava greiðar meiningar um hesar spurningar: Oddfríður Marni Rasmussen frá Listafólkasambandi Føroya, Inger Smærup Sørensen, listfrøðingur, umframt eitt umboð fyri Tjóðpall Føroya.

Tað er Tjóðveldi, sum skipar fyri fundinum.

# Um Aldur og ævir

**Søgan í filminum *Aldur* eftir Heiðrik av Heygum er so sjáldsom og einastandandi at hon ber øllum, hóast frásagnarpersónurin er orðaríkari enn eg brýggi meg um**

UMMÆLI
*Birgir Kruse*

Fyri nærum fullsettari høll sýndi Norðurlandahúsið týskvøldið 23. februar 2010 tríggjar nýggjar føroyskar filmar. Í førinum hjá Heiðriki av Heygum var talan um frumsýning, tá hann vísti filmin um *Aldur*, ið er ein persónligur filmur um ommuna, sum svimur á vánni í Vestmanna.



Frá fyrstu løtu skapa poetiski tónleikurin og svørthvítu myndirnar ein heilt serligan dám. Men skjóta skiftið til litir órógvar meg eitt sindur. Eg hevði væntað eina meiri stiliseraða framseting, sum nettupp bygdi á hitt kornuta og svarthvíta, ið aftur bendir á minnismyndir, sum við sjóvarmálan seta hin einstaka móti tí almáttuga. Her er tað havið og aldurnar, um aldur og ævir. Filmsheitið gevur góða meining og spælir við í allari søguni.

Søgan er so sjáldsom og einastandandi at hon ber øllum, hóast frásagnarpersónurin er orðaríkari enn eg brýggi meg um. Í hvussu er á stuttfilmi. Søgan flytur meg inn í ein dokumentarfilm, sum eg ikki hevði væntað at sæð við hetta høvið. Hinvegin skapar filmurin samstundis eitt spenni millum stiliseraðu tøgnina og streymandi orðini, har omman leitar út yvir havið og gevur tí, havinum, guddómliga og lekjandi kraft.

Havið fyllir nógv og hevur stóran týdning í føroyskari list. Hvørki her, ella úti í heimi, havi eg sæð eitt so einfalt og samstundis sterkt knýti millum hin einstaka og markleysa havið, sum hetta. Helst minnast øll Carsten Jensen, ið vitjaði her fyri stuttum. Tá segði hann at havið var psykopatiskt og hevði eina øgiliga, smildrandi ávirkan. Beint øvugt vísir hesin filmur havið sum hin lekjandi fylgisveinin.

Hvønn dag gongur frásagnarpersónurin fram fyri havið. Hetta repeterandi einfeldni minnir meg á *Offrið* (1986) hjá Tarkovskij, har undursøgan er um plantuna, sum veksur í steinoyðuni.

Allir liðir í filminum eru føroyskir.

*Kelda: http://birkblog.blogspot.com*